## Ætla hægri skatt

Ein spurnarkanning í Danmark vísir, at ein triðingur av kommununum ætla sær at hækka kommunuskattin næsta ár. Harafturímóti hevur eingin kommuna ætlanir um at lækka skattin. Formaðurin í kommunufelagnum, Erik Fabrin, sigur við Ritzau, at stjórnin í Keypmannahavn hevur givið borgarunum vónir um betri almenna tænastu, og at batarnir skulu koma frá kommununum. Men tað krevur meiri pengar sum t. d. hægri skatt.

## Luktar ov illa

Donsku heilsu- og umhvørvismyndugleikarnir krevja nú, at stóra fiskamjølverksmiðjan Triple/Nine í Esbjerg skal fáa sær útgerð, sum skal avmarka tann rama luktin av hálvrotnum fiski og fiskaslógvi. Leiðslan á fiskamjølverksmiðjuni, sum er tann størsta í Norðurevropa, sigur, at útgerðin fer at kosta millum fimm og seks mió. krónur. Men virkið ger greitt, at í framtíðini missa skipini av landingarvirðinum, um fiskurin luktar verri enn ásett.

# hvítusunnu



*Enn eru skipini á svartkjaftaveiði, men reiðarin, Kristian Martin Rasmussen væntar, at flestu skip fara á sild beint eftir hvítusunnu, um svartkjaftafiskiskapurin ikki tekur seg uppaftur rættiliga skjótt*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Umráðandi er, at so stórur partur av norðhavssildini sum gjørligt verður virkaður til matna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

fjør var 6.500 tons, og hetta svarar til umleið 80% av sildini, sum okkara skip fiskaðu.

Kristian Martin Rasmussen væntar, at nú sáttmálin um sildina millum strandalondini er komin upp á pláss, og føroysku skipini soleiðis kunnu veiða upp í 35% av føroysku kvotuni í norskum sjógvi, fara skipini helst at verða á sildini tað, ið eftir er av hesum árinum.

### Gevur fyrimunir

- At vit nú kunnu veiða ein fittan part av sildakvotuni í norskum sjógvi, fer at gera, at vit betur kunnu leggja veiðina til rættis. Nú kunnu vit fylgja sildini inn í norskan sjógv, tá hon fer hagar. Veiðan í føroyskum sjógvi nýtist tískil ikki at verða so "intens", sum hon hevur verið, tí sildin kanska er á veg úr føroyskum sjógvi.

Kristian Martin Rasmussen sigur seg vóna, at hesin møguleiki fer at merkja, at skipini fara at fáa uppaftur meira burtur úr sildini í ár.

## Nýggj Norðborg um eitt ár

FISKIVINNA

Vilmund Jacobsen
*vilmund@sosialurin.fo*

Um eitt ár ella so fær felagið í Klaksvík, sum eigur Christian í Grótinum og Norðborg, nýtt skip, sum verður bygt í Chili.

Nýggja skipið kemur í flotan fyri gomlu Norðborg.

Kristian Martin Rasmussen, reiðari, sigur, at nýggja skpið fer kunna frysta 1400 tons á plattum og hava 1200 tons av fiski í tangum.

Byggikostnaðurin verður umleið 250 miljónir krónur.

- Eg vænti, at skipið kemur í juni/ juli mánaða komandi ár, sigur reiðarin.

Hann vísir á, at umborð á nýggja skipinum verða níggju skerilinjur ímóti teimum seks, sum eru umborð á gomlu Norðborg.

Felagið í Klaksvík eigur hálvt triðja loyvi til veiðina, sum skipini eru á, og hetta fevnir bæði um svartkjaft, sild og makrel.

- Kvoturættindini, sum felagið eigur, skuldu verið nóg mikið til, at skipini rakstrarliga koma at hanga saman, sigur Kristian Martin Rasmussen.



*Um stutta tíð fara eini 50 fólk til arbeiðis á tveimum vaktum á Kollafjord Pelagic*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Bíða eftir sild

**- Enn er sildin heldur rak, og nógv æti er í henni, men skjótt vænta vit, at boð verða send eftir arbeiðsfólkunum, sigur Dánjal Jákup Jacobsen, stjóri á Kollafjord Pelagic**

SILD

Vilmund Jacobsen
*vilmund@sosialurin.fo*

Saksaberg, sum P/F Vinnan í Gøtu eigur, hevur seinastu tíðina landað tríggjar lastir av sild í Kollafirði, men enn eru øll tey stóru skipini á svartkjafti og hava tískil ikki gjørt nakran sildatúr.

Í samrøðu á hesi opnuni, sigur reiðarin, Kristian Martin Rasmussen, seg vænta, at flestu skip fara á sild beint eftir hvítusunnu, um svartkjaftafiskiskapurin ikki tekur seg uppaftur heilt skjótt.

### Nógv æti

- Eg dugi ikki rættiliga at siga, nær vit kunnu vænta, at gongd fer at koma aftur á sildaframleiðsluna í Kollafirði.

Dánjal Jákup Jacobsen, stjóri á Kollafjord Pelagic, sigur, at sildin, sum virkið higartil hevur tikið ímóti, hevur verið heldur rak eftir gýting, og nógvi æti hevur verið í henni.

- Men sildin skuldi blivið betur og "fest" seg meira, sum tíðin gongur, leggur hann aftrat.

### 50 fólk

Tá ið sildatíðin rættiliga byrjar, væntar Dánjal Jákup Jacobsen, at eini 50 fólk fara at arbeiða á Kollafjord Pelagic, og arbeitt fer ætlandi at verða í tveimum vaktum.

- Vit hava níggju skerilinjur inn á virkinum, og væntandi verða út við 25 fólk tilsamans á hvørji vaktini, sigur hann.

Dánjal Jákup Jacobsen sigur, at marknaðurin fyri sildina, sum virkað verður á Kollafjord Pelagic, serliga er í Evropa.